


*Paul Watson á brúnni á Farley Mowat*

Heimasíða Sea Shepherds
Yvir heimasíðuna hjá Sea Shepherd kunnu vitjandi geva bilar, smábátar, skip og líkn. um tey ynskja at stuðla felagsskapinum. Og sjálvandi kann ein eisini melda seg til sum sjálvboðin arbeiðskraft.

Í logbókini hjá Watson – nevnd »Master & Commander« – eru hansara vitjanir í Føroyum dagførdar: August 1985 og juli 1986.

Sambært greinaskrivaranum Khatchadourian hevur Watson ikki neyðugu pappírini til heitið »kapteyn«.

ið skrivstovuveldið situr yvir.« Og har frammi á skipinum veitraði Sea Shepherd flaggið, ein eitt sindur annarleiðis útgáva av The Jolly Roger, sjóræningaflagginum. Eftir at myndugleikarnir høvdu tikið vanliga flaggið kunngjørdi Watson fyri síni manning: »Tit eru nú umborð á einum sjóræningaskipi!«

Úti á opnum havi er størsti vandin, ið hóttir Farley, skipið sjálvt. Síðan 2002 hevur tað tríggjar ferðir verið nær við at søkka. Tvær ferðir máttu kavmenn niður at tetta skrokkin fyri at halda skipinum flótandi. (»Lukkutíð, so vóru vit ikki í stormi« minnist ein av manningini. »Tú kann jú ikki senda kavmenn niður, tá ið aldurnar eru fimm metrar.«) Watson metti, at frægasti mátin hjá Farley at enda sínar dagar, var sum ásiglari í tænastu fyri lívið í havinum. Men ein forðing, fyri at hetta skuldi gerast veruleiki, var skjótleiki. Hægsta ferðin var tíggju knobb, sum er langt frá japonsku førunum. The Hunter er hinvegin eitt nógv skjótari skip, sum tí mátti bíða og seinka hvalabátarnar, inntil Farley kom – hetta er altso um hvalabátarnir kundu verða funnir. Japanski granskingarstovnurin, Institute for Cetacean Research, veiðir hval innanfyri The Southern Ocean Sanctuary, hetta er eitt øki á 50 milliónir ferkilometrar, og av I.W.C. útnevnt vart øki. Herfloti Neptuns, við tveimum skipum og einari tyrlu, hevur ongan fyrimun her.

Eftir at skipini løgdu stilt, fylgdu vikur við leiting. Fyrst í februar, 2007, segði Watson mær, at hann ætlaði at kalla flotan í havn. Skipini máttu skjótt taka meiri brennievni og hýrurin á manningini var ringur. Men so, 9. februar, kl. 04:00, sóu teir á Hunter ein bólk av skipum á radaranum: ein óvanlig rød av blunkum fóru eftir skíggjanum, við 14,7 knobb skjótari enn ísfjøll. Himmalin var svartur og tað var kalt í luftini. Kapteynurin á Hunter, Alex Cornelissen, sá ikki meiri enn nakrar metrar framm. Áðrenn hann gav Watson, umborð á Farley 30 kilometrar har frá, boðini, vildi hann hava meiri at vita. Hann stevndi ímóti nærmasta blunkinum og gav tyrluni boð um at kanna nærri. Í lýsingini, meðan himmalin fekk ein myrkan bláa lit, sá tyrluskiparin lanternurnar. Hesin kallaði á Cornelissen og segði, at hann hevði funnið ein hvalabát. Ein av manningini á brúnni á Hunter rópti: »Vit hava funnið flotan!«

Hetta skipið var Nisshin Maru. Ein risi til sjós, við meiri enn fýra hundrað fótum í longd er hetta tað, ið kallað verður eitt virkisskip – tað einasta í japanska flotanum. Onnur før avreiða teirra fong til Nisshin Maru til slakt, innpakking, frysting og gransking. Fyri djóraverndarfólk er hetta boðið uppá alt, sum er skeivt við nútíðar hvalaveiðu: mekaniserað slakt í stórum máti.

Umleið 06:00 legði Hunter seg uppat síðuni á Nisshin Maru. Hvalabáturin setti á kraftmiklu vatnkanónirnar. Bæði skipini lógu nóg tætt til at renna saman, men Watson hevði givið Cornelissen ordrar um at seinka skipinum og ikki renna á tað. Á dekkinum á Hunter kastaðu nakrir av manningini dósur við butyriskari sýru – eitt heldur harmleyst innihald, ið luktar eins og beiskt smør – og roykbumbur yvir á dekkið á Nisshin Maru. Og kring hvalabátin súsaðu skjóttgangandi smábátar, sokallaðir Zodiacs. Hesir komu frá Farley, sum enn var ein fittan tein her frá. Umborð á skjóttgangandi bátunum høvdu tey myndatól og »prop-foulers« – fløkjur av langum endum úr plasttilfari – hesir vóru til at tveita nærhendis skrúvunum á Nisshin Maru. Umborð á øðrum zodiac-bátum høvdu tey naglapistólir. Við hesum skutu tey lítil hol ovaliga á síðuni, so at hvalablóð rann í havið. Sum slagið helt á, bleiv tað kaldari. Aldurnar hægri, kavarok av ymsum ættum og vaksandi vindur.

Ein av skjóttgangandi zodiacbátunum, av Farley, hvarv í storminum. Teir báðir umborð, Karl Neilsen og John Gravois, svaraðu heldur ikki yvir radio. Nærhendis einum gomlum róðri úr bronsu, afturímóti bakvegginum á brúnni, stóð Watson og beit seg í vørrina. »Hvat hendir?« segði hann og hugdi ivasamur yvir á verkfrøðingin Monteiro. Um Neilsen, stýrimannin umborð á zodiacsmábátinum, spurdi hann: »Hevur hann ikki neyðbluss? Eg veit ikki hví, hann ikki hevur neyðbluss umborð!«